## Reimer rýmir

Ein av teimum kendu tíðindavertunum hjá danska sjónvarpinum DR1, Reimer Bo Christensen, fer nú av skíggjanum. Eftir at hava arbeitt á tíðindadeildini hjá DR í 15 ár hevur Reimer Bo Christensen stovnað sína egnu fyritøku, sum millum annað skal gera tilfar til DR. Millum annað er talan um sjónvarpssendingar, sum skulu sendast í 2008 og í 2009. Reimer Bo Christensen hevur skrivað bøkurnar "Min bænk i Abisko" og "Samtaler på TV".



## Ræðast oljuóhapp

Norðmenn, sum eru ímóti, at oljufeløgini fáa loyvi til at útvinna olju og gass úti fyri Lofoten og Vesterålen, halda, at óhappið á Statfjord-leiðini fyrradagin er ávaring, sum má fáa avleiðingar. Bjørn Kjensli, sum stendur á odda fyri átakinum ímóti oljuídnaði við Lofoten og Vesterålen, sigur við NRK, at øki, sum hava so stóran týdning fyri fiskivinnuna, sum Lofoten og Vesterålen hava, tola ikki slík óhapp og mugu tí fáa frið, sigur hann.

# Soleiðis fáa vit 1,6 milliard til altjóða flogvøll í Føroyum

**- Ørskapurin má steðgast og tí má Løgtingið beinanvegin eftir løgtingsvalið í januar taka støðu til at sleppa ætlanini um at gera undirsjóvartunnil í Sandoy og ætlanini at longja flogvøllin í Vágum og at byggja ein altjóða flogvøll fyri pengarnar, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum er framsøgumaður hjá Tjóðveldinum í vinnumálum**

ALTJÓÐA FLOGVØLLUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað fyrsta, sum nýggja Løgtingið noyðist at taka støðu til eftir løgtingsvalið 19. januar, er, um vit ikki skulu sleppa ætlanunum um at gera undirsjóvartunnil í Sandoy og at longja flogvøllin í Vágum.

Hesi bumbuni sleppur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldi, nú valstríðið upp undir Løgtingsvalið er við at verða skotið ígongd av álvara.

Hann sigur, at tað er alneyðugt, at spurningarnir um at gera undirsjóvartunnil í Sandoy og um at longja flogvøllin í Vágum, verða tiknir upp til politiska viðgerð av nýggjum.

- Veruleikin er, at flogvøllurin er ein fløskuhálsur ímillum Føroyar og restina av heiminum og ein tann størsti spurningurin, okkara ættarlið hevur at taka støðu til yvirhøvur, er, um vit í framtíðini skulu liva í einum tilafturskomnum oyggjalandi ella í einum framkomnum samfelagið, mitt í altjóða meldrinum.

- Vit eiga at seta okkum nógv hægri mál enn at longja vøllin í Vágum upp í 1600 metrar. Tí eiga vit beinanvegin at taka avgerð um, at vit skulu hava ein altjóða flogvøll í Føroyum, sum førir við sær, at tað verður livandi í Føroyum í langa framtíð afturat.

### Strika Sandoy og Vágar

Men so reisti Tórbjørn Jacobsen eisini standandi spurningin: Hvar skulu pengarnir koma frá?

Tað hevði hann eisini eitt svar upp á.

Í hesum sambandi vísti hann á, at Løgtingið hevur nýliga samtykt at fara undir tvær stórar íløgur, sum hann helt ikki, at nøkur samfelagsnytta er í.

Onnur íløgan er at longja vøllin í Vágum fyri 400 milliónir.

- Hesum er als ongin framtíð í, tí einasta endamálið er at gera vøllin í Vágum betri hóskandi til flogførini, sum Atlantsflog hevur nú og sum ikki verða gjørd longur.

- Hin íløgan er undirsjóvartunnilin í Sandoy, sum fer at kosta 1,2 milliard, tá ið allur kostnaður er tikin við.

- Samstundis er tað eisini ávíst, at hann klárar bara at forrentar 80 milliónir.

- Tað er ávíst, at hetta er tann íløgan, sum loysir seg allar ringast av øllum fyri samfelagið.

Tórbjørn Jacobsen vísir á, at strika vit hesar báðar íløgurnar, hava longu vit 1,6 milliard til ein altjóða flogvøll í Føroyum.

- Raðfestingarnar í íløgunum eru ikki rættar fyri samfelagið, tá ið tað einasta, vit fáa burturúr, er at pjøssa upp á ein flogvøll í Vágum, sum ongantíð verður brúkiligur, samstundis sum vit fara undir Føroya størstu íløgu nakrantíð, hóast tað kann prógvaast, at tað er samfelagsbúskaparligt vitloysi.

Tí staðfestir hann, at beinanvegin eftir løgtingsvalið má løgtingið og samgongan taka málið upp til nýggja viðgerð og kanna eftir, um vit fáa meiri burturúr at brúka 1,6 milliard til altjóða flogvøll ella um vit fáa meiri burturúr, at brúka tær til undirsjóvartunnil til 1400 sandoyingar og til at leggja 400 metrar afturat vøllinum í Vágum.

Samstundis má tann komandi landsstýrismaðurin í vinnumálum beinanvegin fáa arbeiðið liðugt at finna útav, hvar tað er best at leggja ein altjóða flogvøll.

*- Spurningurin um at gera undirsjóvartunnil til Sandoyar og um at longja flogvøllin í Vágum, skulu takast uppaftur til nýggja politiska viðgerð og har skal støða takast til um vit ikki heldur skulu brúka pengarnar til at byggja altjóða flogvøll fyri, sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður. Og hansara meining kann fáa stóra ávirkan, tí sum støðan er nú, er hann framsøgumaður hjá Tjóðveldinum í vinnumálum*




### Kunnu bíða í fimm ár

Men nú verður ført fram, at vit hava ikki stundir at bíða eftir einum altjóða flogvølli, tí at tað tekur fleiri ár og at tað tí er neyðugt at byggja vøllin í Vágum út ímeðan vit bíða eftir einum altjóða vølli?

- Taka vit avgerðin nú um at vit skulu hava ein altjoða vøll, kann hann standa liðugur um eini fimm ár. Nú hava vit klára okkum við vøllin í Vágum so leingi, og vit klára okkum vælsaktans í fimm ár afturat. Spurningurin er um tað er nakað skil í at brúka 400 milliónir til eina í Vágum, sum bara skal vara í nøkur heilt fá ár.

Men tú atkvøddi fyri at longja vøllin í Vágum?

-Tað er rætt, men tað var ein serlig støða. Tað var tí, at einasta loysn, sum samgongan kláraði at finna, var at fáa 400 milliónir úr íleggingargrunninum fyri Føroyar, men treytin var, at peningurin varð brúktur at longja vøllin í Vágum. Í eini heildarmeting av støðuni, metti eg, at vit máttu fáa sum frægast burturúr og tí mæltu vit av øllum illum til at longja vøllin í Vágum 600 metrar. Men tá ið undirtøka heldur ikki var fyri tí, góðtóku vit, at hann bara verður longdur 400 metrar, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann staðfestir, at tá ið eitt komandi Løgting fer at raðfesta íløgurnar av nýggjum, skulu íløgurnar í Sandoyartunnil, í at longja vøllin í Vágum og íløgan í ein altjóða flogvøll, setast upp ímóti hvørjum øðrum, fyri at vita, hvat samfelagið fær mest burturúr.